## Tórshavnar Musikkskúli & Grunnur Thorvalds Poulsens av Steinum

Eftirmeting - árið 2015

Fyri einum ári síðani gjørdi fyrrverandi leiðarin á Tórshavnar Musikkskúla eina avtalu við nevndina fyri Grunn Thorvalds Poulsen av Steinum um at lata Tórshavnar Musikkskúla umsita kr. 50.000,- av gávugóðsi grunnsins í trý ár.

Skúlin avgjørdi fyri stuðulsupphæddina í 2015 at skipa fyri einum klaverskeiði og at bíleggja eitt nýskrivað verk til norðurlendskt strúkaraverkskeið.

Klaverskeiðið var fyri framkomnum næmingum í juni 2015 við kenda klaverlæraranum Elzbieta Wiedner-Zajac, fyrrverandi professara á Universität für Musik und darstellende Kunst í Wien.

Skeiðið varð hildið við 14 luttakarum úr Havn, Eysturoy og Klaksvík. Elzbieta Wiedner-Zajac undirvísti næmingunum dagarnar 1. – 4. juni 2015. Elzbieta hevði sjálv eina konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 5. juni og skeiðsluttakararnir høvdu konsert í Havn leygardagin 6. juni 2015.

Luttakararnir vóru sera væl nøgdir og hildu seg hava lært nógv. Serliga teir meiri framkomnu næmingarnir fingu ómetaliga nógv burturúr hennara vitjan.

Í august var skipað fyri NYSS skeiði fyri fimtu ferð, hesuferð í Føroyum.

NYSS er stytting fyri Nordisk Yngre Strokstafet. Hetta er ein strúkarastevna, ið hevur sum mál at savna dugnaligastu ungu strúkararnar í Norðurlondum.
Á stevnuni vóru næmingar úr Grønlandi, Íslandi, Danmark, Svøríki og Føroyum.
NYSS ferðast millum Norðurlondini og hetta var fyrstu ferð hon var hildin í Føroyum.

Umleið 100 strúkarar í aldrinum 6 – 16 ár og lærarar teirra hittust í Tórshavn í døgunum 31. juli – 7. august 2015, har tey vandu saman.

Í hesum sambandi skrivaði Agnar Lamhauge nýtt verk, sum varð frumframført av strúkiorkestri í Norðurlandahúsinum, og var partur av stuðlinum frá grunninum brúktur til at fáa verkið bílagt og skrivað.

Hjá ungum strúkarum hevur tað stóran týdning at spæla nýskrivað verk, og tá verkskeiðið nú var í Føroyum, var nærliggjandi at biðja føroyskt tónaskald skriva verk.

Tónleikaverk eru altjóða á tann hátt, at ein og hvør kring allan knøttin, sum lesur nótar kann brúka verkið aftur, og hevur hettar tí týdning bæði fyri tónleikarar í Føroyum, men eisini fyri tilknýtið til aðrar tónleikarar í útlondum.

Næmingarnir fingu nógv burturúr venjingum og framførslu av nýggja verkinum, sum varð framført undir leiðslu av Bernharði Wilkinson.

**Agnar Lamhauge skrivar soleiðis um verkið:**

*Verkið er skrivað í 4 satsum, og er samanrenning av ymiskum listarligum og pedagogiskum hugskotum, ið eg havi gingið við eina tíð.*

*Á tí listarliga planinum var hugskotið fyrst at innarbeiða allar fýra vanligu føroysku siðbundnu sjangrurnar í eitt verk. Verkið skuldi eisini taka støði í klassiska forminum, ið symfoniur vóru gjørdar eftir. Eg havi altíð kent tað so, at eg havi hildið tað verið óheppið tá gamlir formar bara hvurvu ella vóru fataðir sum gamaldags. So fyri meg er tað eitt spennandi mál at seta sær, hetta at fáa gamlar formar s.s. sonatuformin at virka saman við nýggjari meir eksperimenterandi formum. Og eg meti, at tað hevur eydnast væl í hesum verki.*

*Verkið tekur støði í tí so aldargamla føroyska siðbundna tilfarinum. Eg havi eftirhondini arbeitt nógv við bókunum hjá Marionnu Clausen, og har fann eg brigdi av siðbundnum løgum, ið eg helt hóskaði til. - Av tí at verkið lutvíst skuldi spælast av og fyri útlendingum, vildi eg finna brigdi, ið vóru nokkso løtt at lurta eftir, men sum tó eisini stóðu tónlistarliga sterkt. Tað haldi eg eydnaðist.*

*Formurin skuldi vera tann klassiski, við 1. satsi við einum høvuðstema frá einum kvæði og síðutema frá eini vísu. Annar satsur skuldi vera stillari, og til tað helt eg eitt kingolag hóska væl. 3 satsur fekk tema úr einum løttum skjaldri og 4. satsur kókaði tilfar úr øllum undanfarnu satsunum saman.*

*Fyri at hetta ikki bara skuldi vera aftureftirlítandi verk, innarbeiddi eg ymiskar kompositiónsteknikkir í satsirnar. Summir eru harmoniseraðir á púra traditionellan romantiskan hátt. Aðra staðni verður meir meditativt rytmiskur dronkendur kompositiónsháttur brúktur, og aftur aðrastaðni brúki eg ein harmoniseringsteknik, ið eg sjálvur byrjaði at útvikla seinastu tíðina, eg gekk á konservatorinum. Teknikkurin tekur støði í harmoniskum speglvendingum.*

*Á tí pedagogiska planinum var hugskotið hetta at skriva stemmir á fleiri niveaum, soleiðis at strúkarar á ymiskum niveaum kundu fáa væl burtur úr at spæla verkið. Hetta at lata nýbyrjarar og framkomnar tónleikarar spæla saman haldi eg er sera spennandi - sjálvandi fyrst og fremst pedagogiskt, men ikki bara... Listarliga er tað eisini ein sera spennandi avbjóðing, um tað ber til at fáa slíka samanrenning at ljóða trúverduga, soleiðis at lurtarin fær upplivingina av einum lidnum listarverki, heldur enn einum vælmeinandi pedagogiskum projekti.*

*Stykkið var væl móttikið, bæði av lurtarunum í Norðurlandahúsinum, og ikki minst av bæði lærarum og næmingum á skeiðnum.*

Tórshavnar Musikkskúli er fegin um stuðulin úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum og metir stuðulin í 2015 vera farnan til viðkomandi endamál, ið veruliga gera mun.

*Tórshavn 12. januar 2016*

Vinarliga / Best Regards

Andrea Heindriksdóttir

Leiðari / Manager

______________________________

Tórshavnar Musikkskúli / Tórshavn School of Music
Tórshavnar kommuna/Municipality of Tórshavn

Tórshavnar Musikkskúli

Frúutrøð 1, FO-100 Tórshavn

Tel. 302470 – Mobil. 51 33 12
andrea@torshavn.fo

www.tm.fo